N‡tt termo-rútavirki í Kollafir›i

Atlantic Pane byggir n‡tt termorútavirki inni á Ósábakka í Kollafir›i

Mynd: Edvard Joensen

Atlanticpane í Kollafir›i fer komandi vár at flyta í n‡ggjan virkisbygning inni á Ósabakka, har bæ›i rútavirki og handil fara at húsast

VIRKISBYGGING
Edvard Joensen

Kollafir›i: Termorútavirki› Atlantic Pane fer komandi vár at flyta úr hølunum vi› Sjógv í n‡ggjan virkisbygning á Ósabakka innast í Kollafir›i.

Virksemi› er vor›i› ov nógv til at húsast í verandi bygningi, sigur Marian Jacobsen, stjóri á Atlanticpane. Umstø›urnar í verandi hølum eru heldur ikki optimalar. Eitt nú er virksemi› í tveimum hæddum, og ta› ger ta› heila eitt sindur óarbei›sligt.

N‡ggi bygningurin, sum bygdur ver›ur, ver›ur í einari hædd. Har ver›ur alt virksemi› á sama gólvi. Bæ›i framlei›sla og handilsvirksemi.

Bygningurin ver›ur rættiliga stórur. Hann ver›ur 40 metrar langur, og í vestara enda ver›ur hann 18 metrar brei›ur. Í eystara enda ver›ur breiddin heilar 26 metrar. Ta› kemst av, at í tí endanum ver›ur ein útbygningur til handilsvirksemi› hjá Atlanticpane. Tilbygningurin ver›ur gjørdur ni›an úr virkishøllini, solei›is at hann sæst frá landsvegnum omanfyri.

Marian Jacobsen, stjóri á Atlanticpane, sigur, at umframt termorútaframlei›sluna, virki kanska er mest kent fyri, ver›ur so nógv anna› gjørt. Handilin vi› rammum, speglum og ø›rum slíkum brúkslutum, veksur stø›ugt, og tí er ney›ugt vi› betri umstø›um har. Og eisini er byggivirksemi› í landinum vaksandi, og har vi› ver›a fleiri vindeygu brúkt.

Ta› arbei›a fimm fólk fast á Atlanticpane. Tey gera alt, sum er at gera á virkinum. Tá einum berst frá, tekur tann næsti vi›, sigur Marian Jacobsen. Solei›is kann sami persónur bæ›i taka sær av at ramma spegl og myndir inn í handlinum í Kollafir›i, umframt at seta eitt stovurút í á Selatra›.

Vi› økta virkseminum, sum nú er, er sannlíkt, at brúk ver›ur fyri meira fólki, sigur Marian Jacobsen, stjóri, uttan tó at siga, at ta› ver›ur beint nú.

Flutt ver›ur eftir ætlan í n‡ggja bygningin í mai komandi ár. Ta› skuldi veri› gó› tí›, heldur stjórin, solei›is beint upp undir summari›. Tá hætta fólk sær líkasum betri at skifta rútar, enn tey gera á vetri.

Tá flutt ver›ur, ver›a gomlu maskinurnar, sum nú eru á virkinum, tiknar vi›. Men brúk ver›ur eisini fyri n‡ggjum maskinum í samband vi› útbyggingina. Tær maskinurnar ver›a - sum tann í Vaagen - úr svenskum stáli.

Stoypiarbei›inum, sum í løtuni er í gongd, stendur Karstin Joensen í Kollafir›i fyri, me›an restin av byggingini ver›ur bo›in út. Ta› er ikki gjørt enn. Marian Jacobsen vil ikki siga, hvat n‡ggi virkisbygningurin fer at kosta.

HVÍTVØRU-ÚTSØLAN HELDUR FRAM
Innb. ovnur og keramik pláta úr 6.995,-
Innb. ovnur og vanligar plátur úr 3.890,-
Dustsúgvarar úr 231,-
Uppvaskimaskinur úr 3.995,-
Siemens komfýrur við keramik plátu Fyrr 9.420,- NÚ 7.425,-
Køliskáp úr 1.995,-
Frystiskáp úr 2.095,-
Vaskimaskinur úr 3.995,-
Køli-/frystiskáp úr 2.995,-
Mikroovnar úr 995,-
Kaffimaskinur
Breyðristarar
El-ketlar
Dustsúgvarar
Eggjakókarar
El-tannbustir
Strúkijørn o.m.a
÷30%
Avmarkað nøgd! Myndir eru bert vegleiðandi.
pf. KLEMENT PETERSEN
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60
Sosialurin - 311820

Alt sn‡r seg um at tora

Mynd: Jens K. Vang

Rasmus Klipp ver›ur hann nevndur og mánadagin s‡nir hann myndir fram í SMS. List er ikki bert f‡rakantar á vegginum, leggur Rasmus dent á. Hann metir eisini sum list at liva lívi› rætt. Vit hava hitt Rasmus til eitt prát um list, lív, ímyndina av hvør ger hvat innan heimligu veggirnar og mangt anna›. Vit klippa eina løtumynd av Rasmusi Rasmussen

LÍV & LIST
Dagfinn Olsen

Hann er ein av kendu havnarmyndunum. Og myndir er júst ta›, i› hann evnar burturúr Havnini, tó at hann eisini finnur myndevni uttanfyri høvu›sta›in.

Rasmus Rasmussen er tey seinnu árini rættiliga vor›in kendur og vælumtóktur fyri sínar frálíku klippmyndir. Men hann dugir anna› og meira og er ein, i› fær ta› mesta at rigga, i› hann fer í holt vi›. Hann er handverkari og fittur í hondunum.

Ta› bera eisini hús hansara bo› um. Tá eg skal grei›a myndamanninum frá, at húsini hjá Rasmusi standa í Mammulág í Havn, beint omanfyri vi›arlundina, so er skjótt hann raknar vi›, tá eg grei›i frá húsunum. Gul og sermerkt vi› ymsum útskornum á til pr‡›is.

Innkomin leggur ein beinanvegin til merkis allar lutirnar á vegginum, i› avgjørt mugu hava sína søgu, vøkru rundu hur›arnar, myndirnar av gomlum havnarmonnum - familjan, og myndirnar eftir William Heinesen, i› var granni og systkinabarn mammu Rasmus. Hana kenna tey flestu eisini, tí hon nevnist Rigmor Restorff.

Rasmus tekur fegin ímóti, bjó›ar kaffi og práti› gongur beinanvegin. Bla›ma›urin er hvørki komin úr jakkanum ella hevur fingi› pennin fram, men Rasmus grei›ir livandi frá, prátar, so at talan ver›ur ikki um samrø›u, men hugna og eitt rættiligt kaffiprát um alt millum himmal og jør›.

Sum at loysa krossor›

– Eini 14 n‡ggjar myndir eru á s‡ningini mánadagin, mest myndevni úr Havn, sigur Rasmus, sum tó leggur dent á, at ta› meira enn so kemur fyri, at hann hevur myndevnini av bygd. Hann hevur t.d. gjørt jólamerki og telegram og minnist skemtiliga aftur á ólavsøkuna, tá hann sat og klipti ein jólakalendara fyri Barnabata.

– Ta› var tungt at sita inni og klippa nissur, me›an bygdamenn dansa›u føroyskan dans á gøtuni uttanfyri, lær Rasmus.

Myndirnar hesafer› eru stórar, men stílurin annars ey›kendur.

– Kanska ein fer meira í smálutir nú, men hetta vi› at klippa, er sum at loysa krossor›. Onkutí› kemur meira burturúr, enn a›rar tí›ir. Ein kann lata ta› liggja og so taka fram aftur. Ta› er gott, at eg havi ta› sum ítriv, tí ta› er sum at leika eitt ljó›føri. So vælsigna› at taka fram, tá íblásturin er har, sigur Rasmus, i› ikki er fremmandur fyri tónleikinum. Hann hevur leikt í hornorkestri og var eisini vi› í Gogguni, har mamman, Rigmor, eisini leikti.

– Ta› er ein gle›i vi› tí, sum ver›ur gjørt, tá ta› er ítriv, sigur Rasmus, i› hevur sín stíl og ikki ætlar at broyta hann, tí hann sær onga orsøk, men vil heldur leggja seg eftir at gerast dugnaligari.

– Selji eg eina mynd, so gevi eg ein part av mær sjálvum. Føroyingar meta ofta abstrakta list sum..., ja, snobbarí! Onkur seg›i um Ingálv av Reyni, at hann roynir og roynir, men fær ta› ikki at líkjast, smáflennir Rasmus, i› ikki ætlar sær at gerast abstraktur, bert fyri at vera abstraktur.

William seg›i nei

Rasmus hev›i á ungum árum ætlanir um at fara til Danmarkar at útbúgva seg innan list og klipp. Men systkinabarn mammuna, tann sjálvlærdi úrmælingurin vi› saksinum, William Heinesen mælti honum frá, tí hann helt, at gott var, sum ta› var.

Rasmus skilti tá ikki heilt, men hevur seinni ásanna›, at óiva› hev›i veri› truplari at úttrykt seg, um onkur professari hev›i lagt lag á av n‡ggjum og mælt til ymisk litbland og at pappírsvali› skuldi vera so ella so.

Um byrjanina sigur hann, at kanska byrja›i klippingin í Nonnuskúlanum, har ofta nógv var gjørt vi› klipp, men verulig gongd kom ikki á, fyrr enn umlei› 1982. Tá mælti ein systir honum til at s‡na fram og s‡ningarnar hava veri› mangar sí›ani og ta› er eingin loyna, at ofta ver›ur alt nærum rivi› burtur eftir lítlari løtu, tá Rasmus s‡nir fram.

At tora

Práti› gongur av tí allar besta og ta› skal brátt vísa seg, at lyklaor›i› í kaffiprátinum omanfyri vi›arlundina hóskvøldi› 2. november 2000 er at tora.

Stovan er full av søguligum lutum. Enntá eitt so vakurt chatol, i› fyri ta› kundi veri› keypt fyri d‡ran penga. Men sum øll húsini sum tey eru - bæ›i innan og uttan, so hevur Rasmus sjálvur evna› til.

– Ta› ræ›ur bara um at tora. Líkamiki› hvat ein byrjar uppá, sigur húsavør›urin Rasmus, sum sipar til húsini, i› hann sjálvur hevur bygt, hann sipar til klippingina, ta› at s‡na fram, at hava sett 3 børn í ver›ina, altavbjó›andi starvi› sum húsavør›ur hjá Serforsorgini, men hann sipar sanniliga eisini tosar um lívi›, har ein eisini skal tora.

– Ein skal gera naka› fyri seg sjálvan. Skal ein ver›a nøgdur, má ein gera naka› fyri ta›. Bumsurin í Fælledparkini heitti á Várharra um at lata seg vinna eina millión, men Várharra svara›i, at so hev›i ikki veri› so b‡tt, um hann keypti sær ein lottose›il fyrst, sigur 56 ára gamli Rasmus, sum hevur funni› seg til sættis, eftir at hava veri› giftur tvær fer›ir og sum vir›ismetir heimliga hugnan, tí hann hevur eisini roynt at vakna úr svøvni undir minni heimligum umstø›um, vi› glerpípum í skegginum.

– Alt sn‡r seg um at tora, sigur Rasmus og sipar til t‡dningarmiklar avger›ir, so sum t.d. hjúnarskilna, har ein skal tora og vera til rei›ar at taka avlei›ingarnar. Eisini um ein b‡r í einum pinkusamfelg, sum Føroyum, har slatur er gott undirhald.

– Men ein skal eisini tora at vera ø›rvísi og ikki leggja í slatur og jantelóg, sigur Rasmus, sum er einsamallur undir lonini vi› yngsta soninum, og hann metir vera ikki sørt frekt, at tá hann hevur hildi› fø›ingardag fyri soninum, so spyrja fólk, hvør nú hevur baka› - mestur omman!. Somulei›is, tá okkurt n‡tt plagg sær dagsins ljós.

– Og konufólk, sum koma innar undrast, so hugnaligt er inni og so væl urtapottarnir trívast, tí tey vænta at finna ein einsamallan mann, i› situr á einum ølkassa undir einari berari ljósperu og klippur. Men ta› sn‡r seg um at tora og tora at taka avlei›ingar. Er ein ø›rvísi, so má ein standa vi› ta›, sigur Rasmus og endurgevur ein

Framhald á sí›u 38

VEIÐUÚTGERÐ
Veiðuúgerðina fáa tit frá okkum
Patrónir:
Eley Alphamax 3,4,5
Eley Magnum 3,4,5
Byrsur:
Remington Pumpgun 870 ekspress
Remington Pumpgun 870 wingmaster
Remington 11-87 hálvautomatisk
Baikal (russisk) yvir/undir
Baikal (russisk) síðu/síðu
Magtech (brasiliensk) pumpgun
Sabatti einkult (italiensk)

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR • N. Finsensgøta 5 • Postsmoga 268 • 110 Tórshavn
Tel. 31 14 03 • E-mail: sporthd@post.olivant.fo
Sosialurin - 311820